# rtanum á býnum



*Dagfinn Joensen, Rani Christiansen, Franklin Henriksen, Frans Galán og Jóhannus á Rógvu eru við í nevndin í FUTT, sum hevur sett sær fyri at fáa meira røring í tónleikalívið í Føroyum*

á. Tað ger skránna meira variereraða og gevur okkum møguleikar at leggja fleiri sjangrur inn, sum ikki hava verið við fyrr, sigur Jóhannus á Rógvu Joensen.

## Betri í allar mátar

– Ólavsøkukonsertin hevur nokk ongantíð verið so illa umtókt, sum í fjør. Hetta var av tí, at tað var ikki nóg nógvur kapasitetur at fyriskipa hana, og hon varð tí latin til kommersiell endamál. Hetta fara vit at royna, alt vit kunnu, at gera gott aftur í ár; í øllum førum at gera okkara besta og fáa áhoyrararnar at kenna seg væl, ímeðan hon er. Eitt nú taka vit serligt fyrilit til fólk í koyristóli og seta øki av til tey. Vit arbeiða eisini við at fáa skeinkiloyvi og at skipa eina ordiliga góða barrsølu, sum ikki hevur køir men er skjót og gevur góða tænastu. Yvirhøvur hava vit endurskoðað alt konseptið og roynt at funnið fram til, hvussu vit kunnu betra allar frontar, sigur nýggi formaðurin.

- Eitt eventuelt yvirskot av konsertini ferð til at stuðla tónleikarum og ymsum tónlistarligum verkætlanum. Vit hava til dømis ein stóran trupulleika í infrastrukturinum her í landinum við, at tað er alt ov dýrt at ferðast út á bygd; við bussi, bátum, gjøgnum tunlar og so framvegis. Har vilja vit fegin stuðla bólkum í at fara út at spæla. Fløguútgávur vóna vit eisini at kunna veita stuðul til í komandi framtíð. Og vit vilja fegin fáa FUTT involverað í føroyskt music export, tá tað er komið upp á beinini, sigur Jóhannus á Rógvu Joensen.

**Nýggja FUTT nevndin er:**

Formaður: Jóhannus á Rógvu Joensen
Næstformaður: Frans Galán
Kassameistari: Franklin Henriksen
Skrivari: Rani Christiansen
Nevndarlimir: Jaspur Guttesen, Pætur Magnussen og Dagfinn Joensen

## Virksemið verður økt

- Tíðin er farin frá tí, sum var, og framyvir fer FUTT at virka nógv meira aktivt fyri tað føroyska tónleikalívið. Vit eru í samstarvi við G! Mini og Samvit, har vit í felag fara at halda ráðstevnur. Síðani eru vit í gongd við at leggja til rættis skeið, har tónleikarar millum annað kunnu læra at brúka CODA. Vit fara at hava ymsar fyrilestrar um tónleik og um, hvussu man klárar seg úti í heimi. Í november kemur Mezzoforte trummuleikarin her at undirvísa. Umframt hesi tingini ætla vit eisini at skipa fyri gamlamannadansi í november. Og so fara vit at hava onkrar nisjukonsertir bæði her í Havn og úti á bygd fyri bólkar, sum annars ikki hava so góðan møguleika at spæla á teimum støðunum, sum eru, sigur nýggi formaðurin.

– Generelt skal tað koma meira av røring í tónleikalívið. Vit hava fingið stuðul frá Mentanargrunninum uppá 20.000kr, sum vit millum annað fara at brúka til at skipa fyri konsertum í útjaðaraøkinum. Vit fara eisini at byrja at lobby'a fyri festivalar og onnur stór tiltøk, sum eru mvg skyldug og royna at fáa Mentamálaráðið at revurdera tað. Við øllum hesum vóna vit at kunna fáa ein meira aktivan leiklut fyri tann føroyska tónleikamarknaðin, greiðir nýggi formaðurin í FUTT, Jóhannus á Rógvu Joensen frá.

*Tekstur: Sunneva Háberg Eysturstein*
*Myndir: Álvur Haraldsen*